Filadelfia

„Himmal á jørð“

Tit skulu fáa kraft

„Tíðin rennur sum streymur í á“ sigur kendi sálmurin, og enn eina ferð kann ásannast, at so er; páskaprýðið er illa nokk pakkað burtur, men longu er Hvítusunnan farin framvið og vit standa á gáttini til enn eitt summar. Um vit ongan kalendara høvdu, vóru vit kortini ikki í iva um árstíðina, tí øll náttúran vitnar um tað: fuglar, blómur og ljósar várnætur boða okkum frá árstíðini. Hetta fekk meg at hugsa um tað, sum Jesus sigur við lærusveinarnar í Ápostlasøguni kap. 1 vers 8: *„Men tit skulu fáa kraft, táið Heilagi Andin kemur yvir tykkum, og tit skulu vera vitni Míni, bæði í Jerúsalem og í øllum Judea og Samaria og líka til enda jarðarinnar.“* Vit hava, sum sagt, akkurát hildið Hvítusunnu fyri at fegnast um at Heilagi Andin fall, t.v.s. vit trúgva tí,ið Bíblian/Ápostlasøgan sigur hendi á Hvítusunnu og at Andin er útheltur. Vit trúgva sostatt eisini, at lyftið Jesusar í Áps. 1:8 er uppfylt, hóast vit ikki altíð síggja Kraftina virka í okkara dagligdegi. Um vit hyggja nærri at hesum skriftstaðið síggja vit, at tað umframt lyftið um kraftina við Heilaga Andanum, eisini gevur okkum boð um at vera vitni Hansara. Við hesi útsøgn kann sigast, at Jesus 'byrjar' Ápostlasøguna við at kunngera hvat fór at henda, tá Heilagi Andin var fallin. Jesus vísir eisini á, hvussu gongdin í at breiða gleðiboðskapin út, fór at vera, samstundis sum Hann setur orð á missiónina hjá teimum fyrstu kristnu og allari samkomu Guds.

Við dópi Heilaga Andans varð fyrsta samkoman fødd, t.v.s. at lærusveinar Jesusar gerast ikki til samkomu Guds fyrr enn teir hava fingið Heilaga Andan. Hetta sigur okkum nakað um týdningin,ið Heilaga Andin er ætlaður at hava í lívi okkara; vit kunnu ikki virka eftir ætlan í Ríki Guds uttan Heilaga Andan. Jesus ➥

➥ søguni, sæst hvussu samkoma Guds hevur havt trupulleikar við at liva sum vitni, heldur enn at bara at siga frá um gleðiboðskapin. Orsøkin til hetta er einføld; vit kunnu onki gera í ríki Guds uttan kraftina, sum vit fáa í Heilaga Andanum. Tí er tað so umráðandi fyri okkum – um vit vilja kunngera Guds dýrd og ríki Hansara her á jørð – at vit søkja Heilaga Andan. Tað gera vit heilt einfalt við at brúka tungutaluna, við at samskifta við Hann, so vit læra at kenna rødd Hansara og so vit kunnu læra at virka í náðigávunum.

Á sama hátt sum náttúran ber vitnisburð um árstíðina, við bara at draga frá kraftini, ið jørðin gevur og vera tað, hon er skapt til at vera, so lat okkum eisini gevast við at stríðast í holdinum. Lat okkum ístaðin søkja Heilaga Andan og læra hvussu vit kunnu draga frá kraftini, ið er innan í okkum so vit, bara við at liva okkara gerandislív, kunnu vera vitni um gleðiboðskapin og kærleika Jesusar og virka í náðigávunum, ið Hann gevur okkum. Lat okkum ikki undirmeta týdning Heilaga Andans, men loyva Honum at geva okkum kraftina til at vera vitni, so vit kunnu uppfylla lyftið, sum Jesus gav okkum í Jóh. 7: 38 *„Tann, ið trýr á meg, úr lívi hansara skulu, sum skriftin hevur sagt, renna streymar av livandi vatni“.* Lat okkum raðfesta Heilaga Andan, so vit kunnu kenna hvussu kraftin streymar úr okkara dýpi og flýtur bæði til okkum, og til fólk og umstøður rundan um okkum. Lat okkum stremba eftir at vera vitni á henda hátt, so menniskju við at síggja okkum verða líka tilvitaði um Guds kærleika og dýrd, sum tey vera um árstíðina, tá tey hyggja eftir náttúruni. *AMD*

Familjumøti og grill-dagur 16.06 kl.11

Kvøldini eru blivin ljós og summarið nærkast við ferð. Sum vanligt enda vit barnamøtini fyri summarið við familjumøti og aftaná verður grill og hugni úti í skúlagarðinum aftan fyri Filadelfia.

Á familjumøtinum verður sangur, dansur og talent show. Vit fara at heita á øll, bæði børn og vaksin, sum duga nøkur ting s.s. spøl, dans, sang, ljóðføri, bóltakynstur o.a. um at vísa okkum hvat tit duga. Hetta kann bæði vera ein einsamallur ella bólkur, sum framførir.

Vit fáa vitjan av Símun Jacobsen, sum talar henda dagin.

Í skúlagarðinum vera ymisk spøl og heita vit á foreldur at lata børnini hava uttandura leikur við s.s súklur, rennihjól o.a.

Vit vilja fegin takka Tummas Dj. og Levi fyri teirra trúfesti og hjálpsemi til familjumøtini. Tit gera dagin góðan.

Barnamøtini byrja aftur seinnu helvt av august.

Vit ynskja tykkum øllum eina góða summarfrítíð.

Heilsan Conny og Katy

JUNI 2024

Leygardagur	1.		**Reingerð:** Malena og co.
Sunnudagur	2.	Kl. 11.00 Kl. 11.45	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Linda og Fríðbjørn Ábyrgd/Leiðari: Hildibrandur Lovsongsleiðari: Tummas, bólkur I Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Regin Kaffivertar: Linda og Fríðbjørn
Mánadagur	3.	Kl. 19.00	**Felags bønarmøti í Miðvági (Vegurin)**
Mikudagur	5.	Kl. 10.00	**Bøn**
Hósdagur	6.	Kl. 20.00	**Hugnakvøld fyri kvinnur og ungar gentir** Ábyrgd: Margreth og Linda
Leygardagur	8.		**Reingerð:** Anna-May og co.
Sunnudagur	9.	Kl. 11.00 Kl. 11.45	**Morgunmøti** **Barnamøti** Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður Ábyrgd/Leiðari: Sámuel Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II Uppvørpa: Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Alex Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður
Mánadagur	10.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Mariann
Mikudagur	12.	Kl. 10.00 Kl. 18.30	**Bøn** **Barna- og ungdómsarbeiði**
Leygardagur	15.		**Reingerð:** Karin og co.
Sunnudagur	16.	Kl. 11.00	**Familjumøti v. grill** Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild Ábyrgd/leiðari: Conny Lovsongsleiðari: Bólkur I Uppvørpa: Ása Elisabeth Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Linda Maiken Talari: Símun Jacobsen Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild
Mánadagur	17.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Regin
Mikudagur	19.	Kl. 10.00	**Bøn**
Leygardagur	22.	Kl. 10.00	**Hugnaløta** Ábyrgd: **Hallur** **Reingerð:** Ingun og co.
Sunnudagur	23.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting** **– innsavning til húsið** Møtivertar: Nora, David og Kári Ábyrgd/Leiðari: Ása O. Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Ragnar Talari: Tummas J. Kaffivertar: Nora, David og Kári
Mánadagur	24.	Kl. 20.00	**Lovprísan og forbøn** Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur
Leygardagur	29.		**Reingerð:** Anna og co.
Sunnudagur	30.	Kl. 11.00	**Morgunmøti** Møtivertar: Linda og Fríðbjørn Ábyrgd/Leiðari: Marner Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I Uppvørpa: Jóel Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Høgni Talari: Ása Kaffivertar: Linda og Fríðbjørn

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

sigur tað eisini í Áps. 1:8 „*Men tit skulu fáa kraft, táið Heilagi Andin kemur yvir tykkum, og tit skulu vera vitni Míni,...*“ Vit hvørki kunnu ella skulu vera vitni uttan kraftina í Heilaga Andanum. T.v.s. at kraftin, ið vit fáa í Heilaga Andanum, er grundarlagið fyri allari tænastu og missión í ríki Guds. Tá vit lesa víðari í Ápostlasøguni síggja vit eisini hvussu hetta vísir seg í verki; ápostlarnir virkaðu í náðigávunum og undur og tekin fylgdu teimum. Teir vóru sostatt ikki bara vitni í tann forstand, at teir bara søgdu frá um Jesu lív, deyða og uppreisn, men teir livdu boðskapin við at lív teirra avmyndaði læru og kærleika Jesusar og við at teir virkaðu í náðigávunum.

Nú uml. 2000 ár seinni er boðskapurin í Áps. 1:8 enn líka viðkomandi og grundleggjandi fyri virksemi í samkomu Guds; hetta minnir okkum á okkara kall og samleika, t.v.s., at vit sum børn Guds eru kallað til at liva okkara lív sum ein vitnisburð um gleðiboðskapin. Versið kann sigast at vera ein stórfingin kunngerð, sum setir tónan fyri alt virksemið í ríki Guds og fyri alla Gudsdyrkan okkara. Hetta merkir *ikki,* at vit í okkara holdi skulu stríðast fyri at ‘liva rætt’, men at vit mugu venda okkum til Heilaga Andan, so Hansara kraft kann streyma ígjøgnum okkara sál, sinn og likam, so vit kunnu liva Kristusi lík. Tá hugt verður eftir kirkju-